Fróðskaparsetur Føroya

# Glýsufiskurin á Føroyabanka

16.04.09

Skrivað hevur: Eyðfinn Magnussen

**Grein um glýsufiskin á Føroyabanka í altjóða vísindatíðarritinum "Marine Biology Research". Annar høvundurin er granskari á Náttúruvísindadeildini.**

Greinin viðger grundleggjandi lívfrøðina hjá glýsufiski, sum við Føroyar so at siga bara finst á Føroyabanka. Glýsufiskurin livir á smáum torvum á 15 til 200 m dýpi á landgrunnum eystaru megin í Norðuratlantshavi; frá Marrokko í suðuri, norður til Tróndheimsfjørin. Í útnyrðing er Føroyar markið.

Av tí, at glýsufiskur er ein lítil fiskur, einans einar 20 cm til longdar, verður hann um okkara leiðir ikki fiskaður til matna, men fert tú á fiskamarknaðir í onkrum av Miðalhavslondunum, finnur tú hann sum oftast.

Í greinini verður millum annað hugt at útbreiðslumynstrinum hjá glýsufiski á Føroyabanka, hvussu hann veksur, nær hann gerst kynsbúgvin og hvat hann etur. Greinin ber heitið ”Ecology of poor cod (*Trisopterus minutus*) on the Faroe Bank”, og er skrivað av Eyðfinni Magnussen og Maritu Magnussen.




Útbreiðsla av glýsufiski á Føroyabanka.



Útbreiðsla av glýsufiski. Í ein útnyrðing er Føroyabanki markið.

